Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: H-bygningurin, kostnaður og nágreining av arbeiðinum, sum skal gerast

Spurningar:

1) Hvat er endaligi kostnaðurin av umvælingunum í H-bygninginum – og um hesin ikki er tøkur enn, hvat er so mettur kostnaður?
2) Er fígging tøk til umvælingarnar, sum skulu gerast?
3) Kann nágreiniliga sigast, hvat er eftir at gera, og hvørt hetta arbeiðið fer í útboð ella verður gjørt upp á rokning?
4) Nær verður arbeiðið endaliga liðugt, og bygningurin fult nýtiligur?

Viðmerkingar:

Undirritaði spurdi í august mánaði í ár um hetta sama málið (52-002/2025), men svarið meti eg ikki vera nøktandi. Serliga manglar at fáa greitt at vita, hvat kostnaðurin verður fyri hesar stóru umvælingar og útskiftingar av tí arbeiðinum av teimum manglum, sum skulu gerast.

Undirritaði vónar at fáa eitt neyvari og betri svar um kostnaðin og hvussu umfatandi arbeiðið er, sum er eftir at gera í H-bygninginum, og hvussu hetta væntast at ávirka komandi fíggjarlóg.

Tí er hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 10. oktober 2025

Johan Dahl